# Rækjuskipini flóta tungt

**Tey sjey føroysku rækjuskipini eru so illa fyri í dag, at spurningurin er um tey hóra undan fíggjarliga.**

TRUPULLEIKAR

*Jan Múller*

Hetta ásannaðu formaðurin í Felagnum Rækjuskip, Johan Joensen, landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, og grannskoðarin, Jóhan Martin Jacobsen, í sendingini Føroyar í Dag í Útvarpinum hálvan mars.

Stjórin á rækjuvirkinum á Oyri, Sofus Poulsen, legði afturat, at fara fleiri skip av knóranum, fær virkið álvarsligar trupulleikar, tí virkið kann ikki virkað rækjur úr »triðja-londum« við vinningi.

Tað merkir, at øll rækjuvinnan á sjógvi og á landi er í trupulleikum.

Veðskuldin hjá rækjuskipunum tilsamans er annars ikki so stór, um 222 mió.kr. Harafturat kemur onnur stuttfreistað skuld, tilsamans 36 mió.kr.

Skulu rækjuskipini avdraga einar 22 mió.kr. árliga, táttar árligi fíggjartørvurin í 60 mió.kr. Hetta klára tey ikki, tí raksturin er tungur í løtuni.

Um landsstýrið fer at hjálpa vinnuni við eini kreppuhjálp, veldst um arbeiðið hjá eini skjóttarbeiðandi nevnd, staðfesti Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í sendingini. Henda útsøgnin bendir á, at hann fer at velja nevndina.

Løgtingið samtykti 8. apríl at heita á landsstýrismannin at velja nevndina við tí endamáli at kanna fiskirættindi hjá fjarfiskaflotanum og koma við uppskoti um burðardygga skipan fyri allan fjarfiskiflotanum.

### Skal standa á egnum beinum

Í svari til Felagið Rækjuskip í januar í ár noktaði landsstýrið at stuðla rækjuflotanum.

Grundgevingin hjá landsstýrinum var, at samgonguskjalið sigur, at »Fiskivinnan skal standa á egnum beinum uttan almennan stuðul«. – Tí er avrátt ikki at veita rækjuflotanum stuðul, svaraði Anfinn Kalsberg, løgmaður.

Felagið metti annars støðuna at vera rættiliga álvarsama, tá felagið í juni í fjør skrivaði til landsstýrið, at »verða ikki munagóð stig tikin, verður rækjuflotin fyri slíkum bakkasti, at tað er sera ivasamt, um vit hava ein rækjuflota í framtíðini«.

Rækjuflotin hevur sum heild havt rættiliga stór hall seinastu trý árini.

Hvussu stórt hallið var ífjør er ikki gjørt upp enn, men í 2001 var hallið 34 mió.kr. og í 2000 var tað slakar 15 mió.kr.

Hesi bæði árini kláraðu bara tvey skip seg nøkurlunda, men ífjør høvdu helst øll skipini hall, vísa leysligar metingar hjá grannskoðarum.

Seinastu árini, rækjuflotin hevði avlop, vóru 1998 og 1999, tá úrsltini vóru 5 og 24 mió.kr. Men árini frammanundan góvu eisini hall.

Fýra skip hava givið skarvin yvir síðsta árið og nú eru sjey skip í flotanum: Kviltenni, Sólborg, Høgifossur, South Island, Artic Viking, Ocean Castle og Sjúrðarberg. Men rækjuvirkið hevur keypt Kappan og hann fer væntandi til fiskiskap í mai.

### Rækjuprísirnir lækkaðir og oljuprísirnir hækkaðir

Orsøkinar til trupulleikarnar hjá rækjuvinnuni eru fyrst og fremst, at rækjuprísirnir eru lækkaðir nógv seinastu árini, samstundis sum oljuprísirnir eru hækkaðir.

Harafturat stakk tann trupulleikin seg upp fyri tveimum árum síðani, at kanadiskir myndugleikar noktaðu føroyskum skipum at leggja veiðuna upp í Kanada, tá tey royna vestanfyri. Skipini noyðast tí at sigla heim við veiðini og missa fiskidagar.

Rækjuskipini selja um helvtina av veiðini – stívliga 9000 tons – til rækjuvirkið á Oyri. Restina selja skipini gjøgnum danskar sølufyritøkur.

Fyri trimum árum síðani – á vári 2000 – kundi rækjuvirkið gjalda skipunum 11,95 kr. í meðal fyri kilo.



Jákup Vestergaard, landsstýrismaður



Johan Joensen, formaður í felagnum Rækjuskip

Eitt ár seinri var prísurin fallin niður í 10,78 kr. Fyri einum ári síðani var hann farin heilt niður í 8,19 kr. Og nú kann virkið bara lata úr 6 upp í einar 8 kr. fyri kilo.

Størstu rækjurnar kundu sum liðug vøra seljast fyri meira enn 50 kr. fyri kilo síðsta heyst. Í dag fær virkið bara einar 35 kr. fyri kilo.

Ein orsøk til, at prísurin er lækkaður so nógv, er, at bæði kanadiumenn og grønlendingar hava hækkað sínar kvotur. Tann nógva rækjan á marknaðinum elvir til lægri prísir.

Harafturat kemur, at kinverjar hava ikki keypt so nógvar rækjur sum roknað varð við. Sjúka hevur eisini borið við sær, at japanar hava hildið aftur.

Fyri fáum árum síðani brúktu tey størru rækjuskipini kanska fyri fýra mió.kr. í olju um árið, men nú er ikki óvanligt, at tey brúka einar átta mió.kr. í olju. Alt hevur tí gingið á skeiva borðið.

### Fleiri uppskot um hjálp

Felagið Rækjuskip nevnir í skrivi til Føroya Landsstýri fleiri møguleikar at hjálpa rækjuflotanum:

- FAS-líknandi skattaskipan
- Oljustuðul
- Flutningsstuðul
- Ferðaseðlastuðul

Harafturat hevur felagið borið upp á mál, at landsstýrið rindar ella rindar ein part, tá rækjuskipini keypa kvotu í grønlendskum sjógvi, tí skipini fiska á fjarum leiðum uttan at nakað verður latið aftur fyri í heimasjógvi.

– Tað er ikki tí, at Felagið Rækjuskip vil hava, at skipini skulu hava stuðul. Men gamalt var í Føroyum at hjálpa, tá ástóð, og nú stendur á hjá rækjuskipunum, segði Johan Joensen í Føroyum í Dag.

Formaðurin í Felagnum Rækjuskip legði dent á, at talan skal bara vera um tíðaravmarkaða hjálp.

Men í fyrstu atløgu svaraði landsstýrið noktandi. Nú er spurningurin, um tann skjóttvirkandi nevndin, sum landsstýrismaðurin skal seta, kemur til ta niðurstøðu onkursvegna at stuðla rækjuskipunum.

### Hevur týdning

Rækjuvinnan hevur og hevur havt stóran búskaparligan týdning, staðfesti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard.

Um 200 mans eru knýttir at skipunum, sum ífjør veiddu 19.000 tons av rækjum. Útflutningsvirðið var oman fyri 230 mió.kr.

Harafturat eru eini 75 ársverk knýtt at rækjuvirkinum á Oyri, sum seldi rækjur fyri 123 mió.kr. Rækjuvirkið kann nærum bara dúva upp á føroyskar rækjur, tí handilsavtalan við ES er ikki rækjuvinnuni til vildar.

Fer útflutningurin upp um 3000 tons, skulu 20 prosent rindast í tolli.

Sami tollur skal rindast fyri rækjur frá skipum úr »triðja-londum«.

Fíggjarliga loysir tað seg tí ikki hjá virkinum at keypa rækjur frá skipum úr »triðja-londum«.

Rækjuvinnan kastar eisini annað av sær til føroyska samfelagið – viðlíkahald, proviant, olju, tryggingar og annað – men hvussu nógv er ikki greitt.

Hetta fæst at vita í næstum, tá ein kanning um samfelagsliga árinið hjá rækjuvinnuni, sum Felagið Rækjuskip letur gera, verður liðug.



*Rækjuflotin hevur tað ikki gott í løtuni*



ALUPLAST



Hugsar tú um at keypa bát, so er her eitt sera gott tilboð frá ALUPLAST og ANDERSENS BEDING.

ALUPLAST syrgir fyri stoypingini av bátinum og ANDERSENS BEDING setur motorin í.

ALUPLAST P/F
Gøta 26: 10 mannafar frambygt við húsi og skvatliborði v.m.

152.500,- v/MVG

ANDERSENS BEDING Sp/F
Nannidiesel 4.220 HE 50HK við hydr. gear, aksli, skrúvu v.m.

167.000,- v/MVG

FYRI EINANS

Siglingarklárt 10 mannafar: 319.500,-

Ring og hoyr nærri:
ALUPLAST: Tlf.: 47 5555
ANDERSENS BEDING: Tlf.: 22 2718

Andersens Beding Sp/F